

*Til samans munnu Hanna og Susan hava bundið ikki so fáa troyggjur umborð á Dúgvuni ...*

# túrinum við Dúgvuni

1982, har hann eisini er uppvaksin.

– Eg havi sum so onki ímóti at ferðast, men eg má viðganga, at vit valdu at búseta okkum í Leirvík heldur enn í Klaksvík fyri ikki at kenna okkum so avbyrgd, sigur Jacob Meinhard. Hann væntar tó ikki, at fasta sambandið fær lokka hann at búseta seg í Klaksvík nú

– Nei, nei – konan er frá Lorvík, og vit hava bygt hús har, so nú verður tað, sum tað er, sigur hann.

**Prátið gongur ...**

Nú Dúgvan er á veg aftur til Klaksvíkar, hevur manningin tikið sær stundir til ein stuttan kaffisteðg. Kaffi og rundstykkir eru á borðinum inni í manningarrúminum, og teir eru bæði blíðir og týðir. Teir flestu vita sær okkurt annað arbeiðið, nú Dúgvan gevst, og tann eini, sum ikki veit nakað við vissu, tykist ikki at stúra. Teir gleðast um at hava verið partur av einum ómetaliga góðum arbeiðsplássi, og so fær tíðin at vísa, hvussu tað verður. Teir eru á einum málið um, at tað mest serstaka við einum slíkum arbeiðsplássi er, at tú hittir so nógv fólk, tú annars ikki hevði komið í samband við.

Hvussu nógv, vanlig fólk fara at ferðast gjøgnum tunnilin, ivast teir eitt sindur í. Tað kann skjótt gerast nakað dýrt, um tú skalt av oynni at gera ørindir fleiri ferðir um vikuna heldur onkur. Og órættvíst fyri klaksvíkingar, skoytir ein annar uppí. Mest rímiligt hevði verið, um man kravdi bummpengar á veg úr Havnini og um Brúnna, skjýtur ein triði upp ... og soleiðis gongur prátið ein kanska kortini ikki heilt vanligan kaffisteðg hjá manningini á Dúgvuni um Leirvíksfjørð.



*Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum Bjørn Kalsø, sum ferðast við Dúgvuni hvønn dag, viðgongur, at tað verður ein stórur lætti at sleppa undan siglitúrinum um Leirvíksfjørð*



*Stýrimaðurin Olgar Hansen nýtist ikki, sum fleiri av manningini, at leita sær eftir øðrum arbeiði. Hann fer nú frá fyri aldur*



*Susan hevur fingið autografin hjá stýrimanninum á ferðaseðilin sum eitt seinasta minni um mongu túrarnar, hon hevur ferðast um Leirvíksfjørð*



*Jákup Martin, sum hevur koyrt postbilin yvirum fjørðin hvønn morgun í mong ár, gleðir seg at fáa ein meir normalan arbeiðsdag*